
Jógvan Telling

# Jógvan Telling listaframsýning

Kendi og fólkakjæri tónleikarin Jógvan Telling hevur seinastu tíðina fingist við at mála, og nú fer hann at vísa fram úrslitið av hesum nýggja ítrivi.

Jógvan Telling er sum nevnt kendur sum tónleikari, sum í 1993 var fyri tí bakkasti, at ein blóðtøppur í heilanum fullkomiliga vendi upp og niður upp á lív hansara.

Í dag er hann komin tolu-liga fyri seg. Hann klimprar enn á klaverið, men við einari hond, spælir alskyns ljóðførir - men alt við vinstru hond. Ikki var hann til vinstru hond frá Skaparans síðu, men eisini tað hevur hann vant seg til at brúka, og tað til fulnar.

Fyri at stytta sær stundir, og sum terapi reint sálarliga, sum hann sjálvur sigur, byrjaði hann at mála. Myndaskapanin gevur honum eina friðsælu og gleði, og hann dugir so ómetaliga væl at lýsa egna sinni, ella okkurt hann hugsar um ella upplivir við málningaskapanini.

Jógvan Telling hevur yvir 30 málningar á framsýningini og tað er vert at vitja hendan fantastiska mannin, sum bardi seg út úr tøgnini og partvís innilæsta kroppinum.

Øll verða boðin hjartaliga vælkomin í Smiðjuna fríggjadagin 29 01 2010 kl. 16:00, verður sagt í tíðindaskrivi.




**Sethús á Strondum - Fløtuvegur 28**

| | |
|---|---|
| Grundøki: | 1900 m² |
| Húsastødd: | 45 m² hvør hædd |
| Byggiár: | 1948 |
| Umbygd: | 2007 |



**Íbúð í Hoyvík - Maritugøtu 57**

| | |
|---|---|
| Grundøki: | 77m² |
| Íbúðarstødd: | 73 m² |
| Skúrur: | 4 m² |
| Byggiár: | 2005 |



**Jørð í Miðvági**

| | |
|---|---|
| Innangarðsjørð: | 5496 m² |
| Uttangarðsjørð: | 3 gyllin 5 skinn |

**Lesið meira inni á okkara heimasíðu www.adv.fo**

**HEYGUM & PETERSEN, ADV., BØGØTA 16, FO-100 TÓRSHAVN, TLF.: 351710, FAX: 351711**

HEILSUMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF HEALTH AFFAIRS

# Høli til Heilsutrygd

Heilsutrygd søkir hóskandi skrivstovuhølir til leigu í Klaksvík.

Rúm skal verða fyri 8-10 starvsfólkum, fundarhølum, goymsluhølum, matarstaði v.m. Hølini skulu verða 300 – 350 fermetrar til støddar, tá alt er íroknað.

Heilsutrygd er almennur stovnur og tí skulu atkomuviðurskiftini samsvara almennu reglunum um atkomu.

Áhugað kunnu venda sær til Heilsumálaráðið innan 9. februar 2010 klokkan 12:00.

*Heilsumálaráðið*
*Eiragarður 2*
*FO-100 Tórshavn*
*hmr@hmr.fo*



Heilsutrygd er nýggj almenn heilsutrygdarskipan, sum um ársskiftið avloysti gomlu skipanina við 11 sjúkrakassum kring landið. Endamálið við nýskipanini er at tryggja øllum eina samhaldsfasta almenna heilsutrygd, har allir borgarar verða javnsettir viðvíkjandi inngjaldi og tænastum.

HEILSUMÁLARÁÐIÐ · EIRARGARÐUR 2 · 100 TÓRSHAVN · TEL 30 40 50 · FAX 35 40 45 · HMR@HMR.FO · WWW.HMR.FO